

*Anne Skare Nielsen*

# Fyrilestur av framtíðargranskara

**Ein av forvitnisligu fyrilestrunum, ið verða at hoyra ber yvirskriftina »Hvor originalt – jagten på de gode idéer«, og verður hildin av Liselotte Lyngsø. Hon er útbúgvin og virkandi futurist, stjóri, rithøvdundur og fyrilestrahaldari. Hon er víðagitin runt um og verður nógv nýtt til slíkt tiltøk, bæði í Danmark, aðra staðni í Evropa og í Amerika**

Hon ber heitið »futurist«, ið ein, ið hevur lisið framtíðarfrøði verður kallaður. Framtíðarfrøði er læran um hvussu fyrritíðarligar hendingar, gongdir, menningar og rák, samanbundið við støðuni í dag, og tí, ið er í væntu, ávirka framtíðina. Á hendan hátt letur tað seg sostætt gera, í ein vissan mun, at spáa um framtíðina. Óvæntaðar og skakandi hendingar gera tað tó ógjørligt at vita við vissu hvat framtíðin ber.

Sjálv er hon partnari og framtíðargranskari hjá »Future Navigator ApS«, viðstovnari á »The Innovation Company THNK«, viðstovnari av »Fahrenheit 212«. Eisini hevur hon verið granskingarleiðari á »Institut for fremtidsforskning« og verið við í »Bruxelles Forward Studies«, ið var ein granskingardeild undir EU, 1995-1996. Umframt hetta hevur hon verið dómari til stór tiltøk og nevndarlimur fleiri staðni.

Á heimasíðuni hjá Future Navigator stendur millum annað skrivað um hana: Hon er ein av teimum mest hugvekjandi og ídnaðustu fólkum, ið tú nakrantíð kanst hitta. Hon letur teg ongantíð standa einsamallan í óvissu – um tú veruliga ert áhugaður í at skapa eina betri framtíð.

## Future Navigator

Saman við Anne Skare Nielsen, stovnaði Liselotte Lynsø í 2003 fyritøkuna, Future Navigator. Málsetningurin hjá teimum er at skapa nýggj og meiningsfylt hugskot, um hvat er møguligt í morgin, og umskapa tey til praktisk virði í dag. Tær arbeiða við at vegleiða og hjálpa øðrum fyritøkum og virkjum at skapa nýggj hugskot og eitt arbeiðsumhvørvi, ið fær øll at gera teirra besta. Eisini at fáa øll at finna ella skapa teirra egna javnvág millum arbeiði og lív. Men týdningarmiklast av øllum, at hava tað stuttligt.

Starvsfólkið á Future-Navigator brenna øll fyri at skapa nýggj og virðismikil hugskot, ið verða førd út í lívið. Tí er tað so umráðandi at broyta hvat verður gjørt í dag, fyri at ganga á grønari grasi í morgin.

## Umskapa framtíðina

Fyrilestur hennara verður um endurnýggjan og veiðuni eftir originaliteti. Ein blanding av ástøði og hennara egnu royndum frá hennara egna virki.

Spurd um boðskapin til føroysku virkini, svaraði hon, - At tey skulu royna at skapa nakað, sum er nýtt og originalt: Tað vil siga, einastandandi og við einum »twist«: Har skal vera sál, tað skal kennast gott í búkinum, tað skal fáa fólk at tosa um tað, hvar tey so enn fara, 80% av øllum samskifti er jú slatur. Umframt hetta ynskir hon at tilvita føroysk virki um, at tað er av alstórum týdningi at væran er av góðari góðsku, og passar saman við tí, ið longu er á marknaðinum. Fólk brúka jú ikki pengar uppá nakað nýtt, um tað ikki passar inn í tað mynstrið, ið vit longu hava skapað.

Í tilvitanini er týdningarminkið at virkini eru tilreiðar at seta spruningar, bæði við tey sjálvi, við tað, ið er frammi og við marknaðin.

Ein av sterkastu boðskapunum, ið kemur fram í ár á Vinnudagnum, er týdningurin av, at virki tora at leypa útí ymiskt nýtt, bara fyri at vita og kanna um tað riggar. Nýhugsan og kynstrið at tora, vera í hásæti.